Stjørnan-VB 16-18 (6-10):

VB vann í Klaksvík

Dómararnir møttu ikki til avgerandi dystin, har gestirnir dugdu betur at gera mál. Heimaliðið misnýtti fýra brotskøst og nógvar opnar kjansir

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

VB var samanumtikið betra liðið, og tó at Stjørnan helst iðrar seg um misnýttu møguleikarnar, so mundi talan hóast alt vera um ein uppibornan sigur

VB fekk fulla úrtøku burtur úr longu ferðini úr Vági og norður til Klaksvíkar um vikuskiftið.

Tá ið liðini hittust í fyrru hálvu, vóru tað klaksvíks-kvinnur, sum vunnu, men hesaferð helt oddaliðið í kvinnudeildini seg frammanfyri allan dystin og vann at enda við tveimum málum.

Hóast VB var á odda allatíðina, so var Stjørnan fleiri ferðir um reppið at koma inn í dystin aftur, men tær vóru ikki nóg drúgvar, tá tað snúði seg um at gera mál.

Fyrsta partin av dystinum gekk javnt á, men stórur munurin var, at VB-kvinnurnar fingu fleiri mál. Stjørnan misnýtti tvey brotskøst beinanvegin, og aðrir opnir kjansir vórðu eisini tveittir burtur frystu 20 minuttirnar. Verjuspælið hjá heimaliðnum gekk væl hendan partin av dystinum, men tær vóru eiðasørar í hinum endanum.

VB fekk tak á

VB fekk betur skil á sínum verjuspæli síðstu 10 minuttirnar fyri hálvleikin, tær vórðu meira kontantar og betri skipaðar, og so var hurðin mest sum latin aftur, og munurin millum liðini vaks til fýra mál.

VB brúkti nógva tíð til at byggja álopini hjá sær upp, og við hvørt tóktist tað, sum um dómararnir, sum ikki vóru teir, ið áttu at døma dystin, góvu oddaliðnum í so langan snór.

Tá ið liðini hildu steðg, vóru fýra mál á muni, og tá tóktist tað, sum um VB hevði fingið rættiligt tak á støðuni.

Tær royndu

Stjørnan legði harðliga fyri í seinna hálvleiki og minkaði beinan vegin um munin, men tær kláraðu ongantíð at koma upp á javnt. Tá ið tað stóð á hjá oddaliðnum, høvdu tær onkursvegna orkuna til at býta frá sær aftur, og so kláraðu tær at halda seg frammanfyri.

Stjørnan hevði miskeiðis í seinna hálvleiki at minka munin til eitt mál, men spælandi venjarin hjá Stjørnuni, Danijela Erkevic, misnýtti brotskastið, og síðani tørnaði VB til aftur og økti leiðsluna upp í fimm mál.

Móti endanum hevði heimaliðið umsíðir strítt seg fram til, at eitt mál var á muni, men so fekk VB brotskast og skoraði til endaliga úrslitið, 18-16.

Sum gongdin í dystin var, tóktist tað ósannlíkt, at heimaliðið kundi vinna. Hvørja ferð tær minkaðu og royndu at berja seg upp á javnt, hevði VB avlopsorku til at gera fleiri mál.

Eingir dómarar

Dysturin var seinkaður nakað, tí dómaraparið, sum var sett at døma hendan avgerandi dystin, kom ikki fram. Orsøkin segðist vera, at dómararnir høvdu ikki fingið boðini frá Hondbóltssambandinum um, at dysturin var fluttur nakað fram.

Hetta var í øllum førum óheppið fyri spælararnar og dystin, og slíkt skal ikki koma fyri.

Liðini bæði samdust um, at tveir avbygdamenn í Klaksvík dømdu dystin, og teir báðir, Geir Wardum og Egil Steintórsson, komu væl frá uppgávuni.

Dysturin í tølum:

Stjørnan-VB 16-18 (6-10)
Málskjúttar:
Stjørnan: Danijela Ercevic 8(4), Natasha Stamenkovic 6, Joan M. Joensen 1, Gunnvør Isaksen 1
VB: Daiva Toumaite 7(4), Reda Kurkuaskiena7(1), Arnleyð Hjelm 2, Gurið Mortensen 1, Rannvá Augustinussen 1
Brotskøst: Stjørnan 8, VB 7
Útvísingar: Stjørnan-2, VB 1
Dómarar: Geir Wardum & Egil Steintórsson

Tjaldur-Kyndil 17-21 (7-11):

Kyndil á heiðursmerkjunum

Við sigrinum á Tjaldri vunnu Kyndilskvinnurnar seg fyri fyrstu ferð í ár upp á bronsuplássið í landskappingini

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Hóast kappingarárið hjá Kyndli hevur verið nakað nógv meira misjavnt, enn tær sjálvar høvdu vónað við kappingarársbyrjan, so hava misjøvnu úrsliltini tó ikki sent liðið heilt úr heiðursmerkjastríðnum. Eina mest tí somikið fá av hinum liðunum hava megna at sýnt nakað støðugt hondbóltsspæl.

Tí visti Kyndil undan dystinum í Runavík, at hesin kundi senda liðið upp á bronsuplássið, nú Stjørnan hevði trupla heimadystin móti VB á skránni.

Trygt allan vegin

Tað var tó ikki úrslitið í Klaksvík, sum Kyndil skuldi dúva uppá, men fyrst og fremst syrgja fyri at vinna sín dyst, og tað gjørdu tær so eisini uttan stórvegis hóvasták.

Í royndu og veru, so varð dysturin longu avgjørdur fyrstu 20 minuttirnar ella so, tá Kyndil fyrst og fremst hevði eitt gott tak á álopsspælinum hjá Tjaldri. Munurin kom hesa løtuna upp á fimm mál, og nakað munandi nærri enn hesum kom Tjaldur ongan tíð aftur í dystinum.

Kanska royndu tær at gera ein lítlan vørr í seinna hálvleiki, men tá tær so sjálvar misnýttu tvey brotskøst, og Kyndil síðani rættiliga setti ferð á, varð øll luftin so dyggiliga tikin úr teimum. Eina løtu hótti eitt veruligt stórtap, men seinastu 10 minuttirnar tóku gestirnir sær aftur av løttum, soleiðis at Tjaldur hóast alt kundi pynta nakað um úrslitið.

Hørð kapping

Sum sagt, so lyfti sigurin Kyndil upp á trijða plássið í kappingini, men hóast hetta er hægri, enn tær hava verið seinastu tvey árini, so er tað tó eingin orsøk til at hvíla seg hjá teimum grønu. Á pappírinum munnu tær nevnliga vera liðið við torførastu eftirverandi skránni. Næst á skránni er heimadystur móti VÍF, og síðani er talan um útidystir móti StÍF, VB og Stjørnuni, so lætt verður tað undir ongum umstøðum. Hinvegin, so er útgangsstøðiðið nú tað besta, sum tað hevur verið í ár, so tað røkist kanska fyri, at Kyndil eftir enn eitt turbolent ár kortini kann fáa okkurt slag av løn fyri stríðið.

Hjá Tjaldri er hinvegin lítt til, at stríðið hevur verið til fánýtis. Eitt skifti í vár sá annars ikki heilt galið út, eftir at liðið hevði vunnið heimadystin á Neistanum, men síðani hevur bara gingið skeiva vegin. Munurin upp til Neistan er nú seks stig, og tó at tað á pappírinum enn eru 12 stig at spæla um, so munnu sjálvt mest optimistisku runavíkingarnir nú ásanna, at slagið er tapt, og at liðið aftur má taka til takkar við aðru deildar hondbólti komandi kappingarár.

Dysturin í tølum

Tjaldur-Kyndil 17-21 (7-11)
Málskjúttar:
Tjaldur: Lenka Ribaric 7(1), Oddvá Fossdalsá 5, Mona Langgaard 2(1), Vesna Tomajek 1, Kristine Ellingsgaard 1, Ann Mari Østerø 1
Kyndil: Sonja Smiljic 4, Ann Mari Wang 4, Lotte Sørensen 4(1), Marjun Tróndarson 3, Annika Thomsen 2, Hildur Mikkelsen 2, Ileana Manolescu 1, Heidi Maria Akselsen 1
Brotskøst: Tjaldur 5, Kyndil 3
Útvísingar: Tjaldur 3, Kyndil 2
Dómarar úr Neistanum: Sámal Hansen & Kristian Johansen

Føroysku talvútisetarnir vunnu tepran sigur, men mistu tó í oddinum, har Hillerød nú er hálvt annað stig frammanfyri, eftir at teir vunnu 7-1 í sínum dysti

Kramnik og Leko á odd

Tætt er í toppinum í sterku GM-kappingini í Linares. Hálvt stig eftir Kramnik og Leko koma Kasparov og Anand, nú fimm umfør resta í.

TALV

Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Siðvanda Linares kappingin hevur havt sama vinnara seinastu fýra árini, nevnliga Garry Kasparov. Og oftani hevur hann vunnið leikandi lætt og við fleiri stigum niður til næsta mann í røðini. Í fjør gav tann tá 18 ára gamli Ponomariov tó honum dygga mótstøðu, og tað var ikki fyrren í næstseinasta umfari, tá Kasparov vann á júst Ponomariov, at avgerðin fall.

Í ár er manningin petti sterkari við eitt nú Kramnik og Leko, ístaðin fyri Shirov og Ivanchuk sum leiktu við í fjør. Shirov hevur annars júst vunnið eina sterka kapping í Reykjavík, framman fyri Korchnoi, Macieja og Sokolov.

Kasparov reist seg — Kramnik ósigraður

Sum nevnt varð í seinasta talvteigi, vann 15 ára gamli Radjabov á Kasparov í øðrum umfari. Radjabov er síðani ógloymandi sigurin steðgaður upp, meðan Kasparov hinvegin hevur reist bringu við góðum sigrum á Ponomariov og Anand. Sunnudagin bleiv hann tó steðgaður av Kramnik, sum fekk kærkomnan javnleik við svarta fólkinum. Kasparov valdi, tá hann ikki sá seg føran fyri at vinna talvið, at offra mann fyri at fáa ævigt skák.

Kramnik er einasti telvari sum er ósigraður. Fimm javnleikir og tveir sigrar stendur higartil á konto hansara, og er tað ikki ein óvæntað skora av tí altíð støðuga russaranum. Leko, sum somuleiðis hevur hálvtfimta stig, hevur vunnið trý, leikt tríggir javnleikir og tapt eitt talv. Anand varð banamaður hansara. Leko er annars kendur fyri at sínar mongu javnleikir og varliga spæl, men seinasta árið er hann vorðin skarpari í spælistílinum.

Sjey luttakarar eru, og tískil hevur ein telvari fríumfar í hvørjum umfari. Bert spaniólin Vallejo hevur leikt eitt talv færri enn hinir.

Støðan eftir sjey umfør

Kramnik (2807)	4,5 av 7
Leko (2736)	4,5/7
Kasparov (2847)	4,0/7
Anand (2753)	4,0/7
Radjabov (2624)	2,5/7
Ponomv. (2734)	2,5/7
Vallejo (2629)	2,0/6

Dupultumfar verður leikt, og sunnudagin bleiv fyrsta talvið í seinnu helvt leikt. Fimm umfør resta í, og ringt er at meta um nakran kláran favoritt. Kramnik hevur leikt síni talv móti Kasparov, og hevur eisini hvítt móti hinum oddafiskunum, Anand og Leko. Tí hevur hann kanska bestan møguleika.

Kasparov hevur vunnið tíggju slíkar superstórmeistarakappingar á rað (!) og vil sjálvandi halda fast í hesum frálíka stima. Tapið ímóti Radjabov kann koma at kosta honum dýrt, men hinvegin er hann kendur fyri góðar endaspurtar og telva sítt allarbesta tá á stendur.

Nógvar talvheimasíður fylgja við Linares. www.chessbase.com hevur øll talvini, frásagnir og myndir úr kappingini, og er annars ein frálík heimasíða fyri talváhugaði. Eisini www.weekinchess.com er skjót við dagføringum og tíðindum kring talvheimin.

Útísetar vunnu — men eru nr. 2

Nú er bert eitt umfar eftir í donsku liðkappingini, og føroyingar stríðast um uppflyting til bestu deildina. Næstaseinasta umfar í vikuskiftinum varð eitt lítið afturstig, hóast tepran 4,5 — 3,5 sigur á Arbejdernes Skakforening (AS 04). Eyðun Nolsøe, Heini Danielsen og Terji Petersen vunnu; Nikolaj Borge, John Arni Nilssen, og Carl Eli N. Samuelsen leiktu javnt meðan Heini Olsen og Regin Reinert taptu. Finn Nøhr gav tíverri avboð, og tí traðkaði liðformaðurin Regin inn á 8. borð.

Hillerød, sum framman undan lógu á triðja plássinum, vunnu knúsandi 7-1 sigur á botnliðnum Øbro. Júst Øbro hitta føroyingar í seinasta umfarinum, sum verður eitt satt nervaumfar. Hillerød møta Fredriksberg sum er hampiliga sterkt, og hóast Hillerød eru hálvtannað stig framanfyri okkum, kunna útísetarnir við stórsigri á Øbro væl møguligt vinna deildina. Áttanda og seinasta umfar verður 16.mars.

Støðan í toppinum

Hillerød	29,5
Føroyar	28,0
Helsingør	27,0
Fredriksberg	26,0

Talvið hesa vikuna

Kramnik,V (2807) - Radjabov,T (2624)
XX SuperGM Linares ESP (6), 28.02.2003

1.e4 e6 (Radjabov leikar nærum altíð fronsku byrjanini. Og hví skuldi hann ikki eisini roynt seg við somu byrjan sum hann vann við ímóti Kasparov?) **2.d4 d5 3.Ric3 Rif6 4.e5 Rifd7 5.f4 c5 6.Rif3 Ric6 7.Be3 cxd4 8.Rixd4 Bc5 9.Fd2 0—0 10.0—0—0 a6 11.Ff2 Rixd4 12.Bxd4 Fc7 13.Bd3 b5 14.Fh4!** (hetta er í roynd og veru ein teoretisk nýggjheit í hesum varianti. Leikurin tykist logiskur, og sterkur. Fyrr varð Rie2 roynt) **14...h6 15.Rie2 f6** (hvítur hótti g4-g5, og tí leikar Radjabov hendan passiva leik) **16.Fg4 Bxd4 17.Rixd4** (17.Fe6+? Kh8 18.Rixd4 Rixe5!) **17...Ric5 18.Fg6 Rixd3+ 19.Rxd3 Fc4?** (hetta hevur svartur ikki tíð til. Ff7 var treystasti leikur) **20.Rhd1 Ra7 21.Kb1 Fc7 22.f5!** (skræðir svørtu støðuna sundur) **22...Fb6 23.Rh3 fxe5 24.Rxh6 Rf6** [24...exd4 25.Fh7+ Kf7 26.f6! og hvítur vinnur] **25.Fe8+ Rf8 26.Rh8+ Kxh8 27.Fxf8+** (støðan er nú fullkomiliga vunnin) **27...Kh7 28.Rif3 Fc7 29.fxe6 e4 30.Rig5+ Kh6 31.h4 Kh5 32.Ff5 g6 33.g4+Kxh4**

(stuttlig støða, við svarta konginum sum fremsti brikkur) **34.Rh1+ Kg3 35.Rg1+ Kh4 36.Ff6** og svartur verður mátaður í fáum leikum. Radjabov gavst **1—0**